# Kvøldskúlin er ikki bert

**Ì desember høvdu vit eina grein um ta 90 ára gomlu Hilmu Jacobsen úr Kollafirði, sum framvegis gongur á kvøldskúla, og sum hevur gjørt tað ein stóran part av sínum lívi. Kvøldskúlin er tó fyri allar aldursbólkar, sum hava hug at menna seg og at læra nakað nýtt**

FRÍTÍÐ
*Óli Jacobsen*
*olij@sosialurin.fo*

Kvøldskúlin í verandi líki byrjaði í 70-unum við Napoleon Nólsoy sum leiðara. Hann legði frá sær fyri aldur í 2004. Men eftir at Fritleif Henriksen legði frá sær árið eftir, tók Napoleon við aftur eitt skifti, til Johannes Eli Iversen var settur leiðari í januar mánaði 2006. Men Jóannes Eli gjørdist stutt eftir sjúkur og doyði eftir stuttari sjúkralegu. Tá tók Napolen enn einaferð við sum leiðari til nýggjur stjóri varð settur.

Nú er tað Jákup Pauli Strøm, sum er skúlastjóri.

Av vetaranum, sum hava verið við til at byggja skúlan upp kann nevnast Ragna Jacobsen, sum nú eisini hevur lagt frá sær fyri aldur. Á skrivstovuni eru nú Kira Heindriksdóttir og Malan Guttesen.

## Grundarlagið fyri skúlan

Skúlin er grundaður á, at nýtslan av frítíðini skal vera grundað á

*– at vera menniskja*
*– at hava møguleikar*
*– at taka av avbjóðingum og mennast*

Málsetningur er, at skúlin skal vera mentunarskapandi, mentunarverjandi og mentanarboðandi.

Hetta er eisini út frá tí, at ein størri og størri partur av lívinum hjá borgarunum er frítíð.

Hon eigur bæði at verða nýtt til førleikamenning og ikki minni til at skapa eitt gott lívsinnihald við lívsgóðsku, sum er ein fyritreyt fyri trivnaði, virkisfýsni og eini góðari arbeiðsmegi.

At hetta mál eisini verður nátt hampiliga væl sást á tølunum fyri skúlaárið 2007/08:

Tey vísa, at skúlin hevur 3137 nømingar. Læraratalið er 141. Tað eru 231 skeið býtt á umleið 80 lærugreinir)

Skúlin húsast á ikki færri enn 31 støðum í teimum ymsu bygdunum í Tórshavnar kommunu.

## Undirvísingin

Undirvísingin er býtt í 3 partar:
Almenn frítíðarundirvísing
Serstøk frítíðarundirvísing
Frítíðarvirksemi
Tann serstaka frítíðarundirvísingin fevnir um:

Royndarfyrireikandi undirvísing
Serundirvísing
Yrkiskenda undirvísing

Undir serundirvísing hevur skúlin nógv tilboð fyri brekað – menningar- og rørslutarnað.



*Borgmeistarin hyggur hugtikin at næmingaarbeiði*

Sum dømi kann nevnast skeiðsvirksemi hjá ÍSB, Verkstaðnum Vón, Ælaboganum og svimjing í Gundadali. Eisini ymiskur ítróttur, sum t.d Boccia, borðtennis, fimleikur fyri autistar eru millum tilboðini til hendan bólk. Hesi tilboð eru bøtandi og fyrilitarlig.

Skúlin hevur royndarfyrireikandi undivísing í 9. og 10. flokki, sum endar við próvtøku. Endamálið er at lofta teimum, sum eru farin úr skúlanum uttan nakað prógv. Vit hava nógv dømi um næmingar, sum soleiðis hava tikið hægri útbúgving.

Ætlanin var somuleiðis at taka táttin frá áttatiárunum uppaftur, nevniliga at bjóða lærugreinir á HF-støði útaftur sum kvøldlestur. Hetta varð gjørt í samráð við Altjóða skrivstovuna, sum metti, at tørvurin hjá fólki at nema sær eina ella fleiri HF-lærugreinir, fyri at fara undir hægri lestur, er øktur. Avgerðin hesum viðvíkjandi er hjá Mentamálaráðnum, sum tíanverri ikki fekk neyðugu játtanina til vega. Men vónandi kemur hetta í rættlag komandi undirvísingarár.

Yrkiskend undirvísing fevnir um dugnaskapsroynd í sigling, S.R.C.–skeið (VHF) og landbúnarskeið.

Hesi skeið enda øll við próvtøku. Dugnaskapsroyndin gevur førleika til at føra skip upp til 100 tons út á 200 fjórðingar, og landbúnaðarskeiðið gevur próvhavaranum rættindi at søkja um festi.

Sum nakað nýtt verður skeið í dugnaskapssigling fyri frítíðarsiglarar bjóðað út í januar mánaði.

Tann almenna frítíðarundirvísingin, og frítíðarvirksemi annars,sum fyllir meginpartin av kvøldskúlavirkseminum, fevna millum annað um hesar lærugreinar: spinning, plantuliting, skaftvevnaður, rammuvevnaður, myndavevnaður, tøving, til-



*Tey smáu eru eisini uppií*